# Eyðun og Andreas til Noregs

Um eina viku fara teir báðir, Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen á sína fyrstu uppgávu sum altjóða dómarar. Eitt heiti, sum teir ognaðu sær í summar, tá altjóða eygleiðari var í Føroyum í sambandi við venjingardystirnar hjá hondbóltslandsliðunum móti Íslandi.

Dysturin, sum teir báðir skulu døma, er í øðrum umfari av Europa-Cup kappingini fyri steypavinnarar, og er talan um dyst millum norsku og Kypriotisku steypavinnararnar.

Teir báðir vóru annars eisini og dømdu í Aalborg, tá Nøvling-Cup var á skránni herfyri. Sum skilst, so vóru nakrar misskiljingar tá íkomnar, soleiðis at teir báðir tveir teir fyrstu dagarnar dømdu dystir, sum lítið og einki høvdu upp seg, men sum kappingin leið, fingu teir tó tillutað alt størri uppgávur. Og skoðsmálið frá starvsfeløgunum har var, at teir skuldu vera meira enn væl komnir aftur, um teir høvdu hug at aftur, tá nýggj kapping er á skránni um eitt ár.

-mørk

# KÍ størsti favoritturin

Tá hugt verður at oddsunum, sum Nordic-Bet.com gevur upp á føroysku dystirnar hetta vikuskiftið, stendur greitt, at talan er um dystir, sum í útgangsstøðinum verða mettir sum sera javnir. Eitt undantak er tó dysturin í Gundadali millum HB og VB, sum felagið ikki so mikið sum hevur á skránni. Og tað má væl saktans metast sum eitt tekin um, at HB er somikið stórur favorittur, at tað ikki loysir seg at hava teir við á skránni.

Men í hinum førunum verður altso roknað við tættum uppgerðum. Tað er tó áhugavert at staðfesta, at KÍ verður roknað sum greiður favorittur, tá teir taka móti ÍF, eins og mett verður, at TB er nakað sterkari enn GÍ. Viðvíkjandi hinum báðum dystunum - í Runavík og á Eiði - verður mett, at liðini eru at kalla púrasta jøvn.

-mørk

**Oddsini til dystirnar eru hesi:**

| Dystur | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| TB-GÍ | 2,15 | 3,30 | 2,60 |
| NSÍ-Skála | 2,40 | 3,15 | 2,40 |
| KÍ-ÍF | 1,80 | 3,20 | 3,50 |
| EB/S-B36 | 2,35 | 3,40 | 2,30 |

**formuladeildin**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 23 | 12 - 9 - 2 | 49 | 24 | 25 | 45 |
| 2 B36 | 23 | 12 - 8 - 3 | 32 | 14 | 18 | 44 |
| 3 HB | 23 | 13 - 4 - 6 | 60 | 30 | 30 | 43 |
| 4 NSÍ | 23 | 11 - 7 - 5 | 42 | 33 | 9 | 40 |
| 5 EB/Streymur | 23 | 10 - 9 - 4 | 41 | 30 | 11 | 39 |
| 6 KÍ | 23 | 7 - 3 - 13 | 34 | 42 | -8 | 24 |
| 7 GÍ | 23 | 6 - 4 - 13 | 30 | 46 | -16 | 22 |
| 8 ÍF | 23 | 5 - 7 - 11 | 28 | 52 | -24 | 22 |
| 9 VB | 23 | 5 - 5 - 13 | 30 | 51 | -21 | 20 |
| 10 TB | 23 | 3 - 6 - 14 | 22 | 46 | -24 | 15 |

**2. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 14 | 12 - 1 - 1 | 59 | 8 | 51 | 37 |
| 2 B68 | 14 | 12 - 1 - 1 | 54 | 11 | 43 | 37 |
| 3 FSV04 | 14 | 10 - 1 - 3 | 44 | 13 | 31 | 31 |
| 4 AB | 14 | 8 - 2 - 4 | 32 | 28 | 4 | 26 |
| 5 HB | 14 | 6 - 1 - 7 | 34 | 33 | 1 | 19 |
| 6 LÍF | 14 | 4 - 3 - 7 | 38 | 38 | 0 | 15 |
| 7 Sumba | 14 | 4 - 1 - 9 | 27 | 58 | -31 | 13 |
| 8 B36 | 14 | 3 - 3 - 8 | 15 | 34 | -19 | 12 |
| 9 Royn | 14 | 3 - 2 - 9 | 15 | 48 | -33 | 11 |
| 10 GÍ | 14 | 0 - 1 - 13 | 14 | 61 | -47 | 1 |

# Gulldystur á Sandi

**Hóast tað enn er nakað eftir á mál, so munnu tey fægstu vera í iva um, at avgerðin um uppflytingina til Formuladeildina í stóran mun fellir leygardagin**

2. DEILD

*Jákup Mørk*



*Tá B71 í vár vitjaði á Toftum, skoraði Clayton Soares einsmalla málið, sum síðani tá hevur hildið B71 uppi á oddasessinum*

Tey hava ligið lið um lið at kalla alt kappingarárið. B71 og B68 hava fram um øll hini verið liðini, sum kappingin í aðru deild hevur snarað um, og leygardagin hittast tey so fyri seinnu ferð í ár.

Fyrru uppgerðina millum liðini vunnu sandoyingarnir, og bara tað í sjálvum sær var kanska heldur óvæntað. Ikki tí eingin roknaði við B71, men meira tí øll longu undan kappingarárinum høvdu B68 sum risa-favorittar til beinleiðis uppflytingina.

Teir eru kanska eisini framvegis favorittar, men í øllum førum ikki eins stórir, sum teir vóru tað í vár. Og veruleikin er eisini, at B68 er nakað skert, nú teir skulu standa sveinaroyndina at kalla.

Fyrst og fremst, so hevur tað skert liðið munandi, at Julian Johnsson longu í vár varð somikið álvarsliga skaddur, at hann bara hevur havt leiklutin sum venjari - og ikki ein spælandi av slagnum - største partin av kappingarárinum.

Hartil hevur Jann Ingi Petersen fingið sær ov nógv gul kort á kontina. Tað seinasta av hesum kom rættiliga óneyðug, tá B68 annars var trygt á odda móti AB. Og tí er heldur ikki hann tøkur til uppgávuna leygardagin.

Hjá B71 tykist vera víst, at hvørki Símin Hansen ella Rene Clementsen vera tøkir til dystin. Hartil hevur verið ivasamt, hvørt málverjin, Símin Rógvi Hansen, fór at verða tøkur til dystin, eftir at hann fór út við skaða týskvøldið, tá B71 spældi móti HB. Hóskvøldið visti heimasíðan hjá B71 at siga, at tað verður hann ikki, og tí verður tað helst Waldemar Nowicki, sum skal standa millum stólparnar. Men hann man sum so ikki vera tann ringasti eykamaðurin hjá einum venjara at hava. Hartil verður Sverrir Kjærbo helst eisini við í hópinum hesaferð.

Og so kunnu vit hóskandi leggja afturat, at hóast dysturin hesaferð er rættiliga avgerandi, so er hann ikki altavgerandi. Áðrenn endaligi vinnarin av deildini kann kjósast, verður helst neyðugt við í minsta lagi 17 dystum. Og fyri bæði B71 og B68 er galdandi, at tey eiga eina vitjan á í Sandavági hjá FS Vágum 2004, og tað er í øllum førum ein uppgáva, sum er alt annað enn løtt.

# Harpiksið skal finnast fram aftur

**So fer hondbóltslandskappingin aftur ígongd, og longu fyrsta umfarið kann roknast við fleiri áhugaverdum dystum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*



*Kvinnuliðið hjá Neistanum tykist hava styrkt seg væl í summar, og nú skal tað so standa sína roynd, um liðið aftur kann klintra heilt upp á tindarnar*

Tað eru kanska ikki endliga dystir, sum verða avgjørdir topp-dystir, sum standa á skránni, men í nógvum førum verður tó spennandi at síggja, hvussu ymsu liðini eru fyri, nú tey hava brynjað seg til eitt nýtt kappingarár.

Hjá monnunum man størsti áhugin helst vera um dystin í Hoyvíkarhøllini, har H71 við Hannis Wardum á beinkinum skal taka ímóti Kyndli. Umframt Kyndils-veteranin á beinkinum, hava hoyvíkingar til í vetur eisini fingið tilgongd av Jakob Jónsson, og so er spurningurin, um hann er maðurin, sum av álvara kann fáa glið á stóru ambitiónirnar hjá H71.

Á Hálsi skal Neistin royna at prógva, at liðið í ár er betri ført fyri at klintra móti oddinum, enn teir vóru í fjør, tá árið mest av øllum má lýsast sum vónbrot, og í Vestmanna verða tað VÍF og KÍF, sum fara at takast.

**Spennandi Neista-lið**

Hjá kvinnunum tykist Neistin vera liðið, sum hevur gjørt mest við at styrkja um hópin, og fyrsta royndin hjá teimum verður í Vestmanna, har kenningurn, Sophus Dal-Christiansen aftur í ár stendur við róðrið.

Spennandi verður eisini at vita, hvørt Stjørnan aftur í ár skal hava somu styrkina, tá Stjørnan kemur á vitjan, og á Giljanesi skulu meistararnir úr VB prógva, at tær aftur í ár eru eitt lið, sum roknast skal við.

Seinasti dysturin verður í Runavík, har grannarnir, Tjaldur og StÍF fara at takast.